


LESTUR | GRANSKING | DEILDIN | LEITA | INNANVEGGJA | ENGLISH | SEARCH | GO

- Granskingarevni
- Ph.D. verkætlanir
- NVD greinasavn
- Granskingarstovnar
- Greinarøð í bløðunum
- Vísindasøgur
  - Størri atlit til genetiska fjølbroytni
  - Íløgur í gransking í mun til BTÚ minka
  - Framvegis lítið til av toski á Bankanum
  - Dálking á Havnarvág
  - Er jarn avmarkandi fyri vøkstur í havinum?
  - Master samskipari og lestrarvegleiðari á vitjan.
  - FLL 2007 kapping
  - Føroyska bládúgvan
  - Føroyska músin
  - Væleydnað seismikkferð við Magnusi Heinasyni
  - Phd_verja av alduverkætlan
  - Føroyar liggja á kantinum
  - FLL 2006 kapping
  - **163 toskar í 29 hálum á Føroyabanka**
  - Toskur: ein útbrótari
  - Gróður ávirkar kreftir
  - NVD á US Naval Academy
  - 10 dagar frá Tjernobyl
  - Seismikkur á Glyvursnesi
  - Norskur ríkmaður stuðlar gransking í heimbýi sínum
  - FLL kapping
  - Balinski fyrstu ferð
  - Mest geislavirkni í Hvalvík og minst í Hvalba
  - KT-nýskapan krevur útbúgving, gransking og samstarv
  - Miðalvekt á føroyskum seyði
  - Tøknifrágreiðing: Frá atkvøðum til tingsessir
  - Irsk forbindelse?
  - Føroyabanki
  - Alda og streymur
  - Fuglar í Viðarlundini
  - Fiskimiðasavn og kortplottari við streymkorti fyri nærleiðirnar.
  - DNA-kanningar
  - Streym til drívskipanir
  - Seismiskar kanningar á Glyvursnesi
  - Útgerð til aling á harðbalnum økjum
  - Grannljómarin
  - Geislavirkni regnaði yvir Føroyar
  - Kjafturin á føroyabankatoskinum
  - Gráspurvurin
  - Føroysk mjólk
  - Seismiskar kanningar í Vestmanna

# Einans 163 toskar í 29 hálum á Føroyabanka

**Hetta vóru døpru úrslitini frá yvirlitistrolingini, sum Magnus Heinason júst hevur gjørt á Føroyabanka.**

Eftir at hava trolað á 29 ymisku støðum á Føroyabanka, gjørdist samlaða veiðan av toski einans 163 fiskar ella sløk 600 kg av toski. Hetta er ein minking uppá 54% samanborið við toskaveiðuna á heystyvirlitistrolingini í fjør, og einans 6 % av veiðuni í 1997 tá Magnus Heinason fekk 9.210 kg av toski. Eisini hýsan er í minking. Í alt vórðu fingin 2.886 kg av hýsu. Hetta er ein minking upp á 56 % samanborið við árið fyri og einans 20% av hýsuveiðuni í 2003. Hjá upsanum var minkingin í ár 14% samanborið við í fjør.

**Fiskurin ikki rak**

Hóast høvuðsfiskasløgini eru í stórari minking, er tó einki sum bendir á, at fiskinum manglar føði, tí hann er ikki rak. Tá fiskifrøðingar gera upp hvussu feitur fiskurin er, nýta teir hugtakið "konditiónsfaktor". Hetta er lutfallið millum vekt og longd á fiskinum. Hægri talið er, feitari er fiskurin. Hesi tølini peika tó uppeftir samanborið við úrslitini frá í fjør. Kanningin vísti, at toskurin er 1% feitari nú enn fyri einum ári síðani. Hjá hýsuni er økingin 10%, meðan upsin er vorðin 5% feitari, samanborið við kanningarnar á heysti 2005.




*Miðalveiðan av toski, sum Magnus Heinason fekk á yvirlitstrolingini á Føroyabanka í september í ár, var einans 21 kg fyri hvønn fiskitíma. Hetta er 54% lægri enn í fjør og einans 8% av veiðuni í 2002, tá miðalveiðan var 249 kg fyri hvønn fiskitíma.*




*Eisini hjá hýsuni á Bankanum stendur illa til. Hendan túrin var miðalveiðan einans 100 kg fyri hvønn fiskitíma. Hetta er ein minking uppá 56% samanborið við úrslitini frá yvirlitistrolingini á heysti 2005 og einans 8 % av veiðuni í 2002, tá miðalveiðan var 1.210 kg fyri hvønn fiskitíma.*

**Flestu fiskasløgini í minking**

Tað er ikki einans toski, hýsu og upsa, sum minni er til av. Minkingin er galdandi fyri flestu fiskasløgini. Av teimum 30 fiskasløgunum, sum vórðu fingin á túrinum, var minni til av 19 teirra, meðan veiðan einans var størri fyri 6 av fiskasløgum. Hetta eru tó fiskasløg, sum ikki hava týdning fyri føroyska fiskiflotan, eitt nú lálla, glýsufiskur, skrubba, búksvarti hávur og bláriddari. Harafturat vórðu 12 fiskasløg, sum als ikki vóru fingin hendan túrin, men vórðu fingin í yvirlitistrolingini á heysti 2005.

**Fá skip royndu á Bankanum**

At lítið var til av fiski á Føroyabanka sást eisini aftur á fiskiflotanum, tí so at siga eingi skip vóru at síggja á Bankanum. Fyri nøkrum árum síðani, hevði Magnus Heinason ofta ilt við at taka allar trolstøðirnar, sum skuldu takast á yvirlitistrolingini á Føroyabanka, tí ikki var atkomandi fyri teimum nógvu línubátunum, sum lógu og royndu eftir toski á tí grunna partinum av Bankanum. Men soleiðis var ikki hendan túrin. Tá vit komu út, vóru einast tveir línubátar at síggja. Hesir lógu í kantinum og royndu eftir skøtu og longu.

Vilt tú vita meira, set teg í samband við:

Eyðfinn Magnussen, tel. 352 550, e-mail EydfinnM@Setur.fo

---